

DAGBLA

NR. 109 - 54. ÁRG. FRÍGGJADAGUR 7. OKTOBER 1988

Óli Breckmann í áheitan á donsku stjórnina:

Fingrarnar vekk frá Namibia

Føroyskir fiskimenn ynska neyvan danska uppiblanding í tær royndir, føroyingar gera at bjarga skipum og búskapi undan vanlukku við avtalum við onnur lond.

Altjóða privatrættur er á føroyskari síðu í Namibia-spurninginum, segði Óli Breckmann m.a. á Fólkatingi í gjár.

MÁNADAGUR 10. OKTOBER 19

Jógvan Sundstein, formaður Fólkafloksins

Nej tak, hr. Uffe Elleman Jensen

— Uffe Elleman Jensen skal vita, at hansara uppílegging í okkara fiskivinnuligu sáttmálaviðurskifti við onnur lond verður ikki told.

— Heldur ikki kunnu vit góðtaka, at danski uttanríkisráðharrin leggur seg út í føroyska valstríðið við í almennum skrivi til løgmans at gera vart við, hvønn meiriluta hann vónar at síggja á Føroya Løgtingi aftaná valið!

— Brævið frá uttanríkisráðharranum vísir okkum bert einaferð enn, hvussu galið tað er við okkara stjórnarskipan, har aðrir halda seg hava myndugleika at stýra og taka avgerðir okkara vegna.

Bæði Jógvan Sundstein og partamaður hansara á Dagblaðnum vóru skjótir at biðja Uffe Ellemann Jensen halda fingrarnar vekk, tá hann segði sína hugsan um Namibiamálið. Nú fara somu menn til Uffa at biðja um hjálp

samtyktirnar koma í gildi 1. apríl.

Fyrsti trupulleikin er tann tíðarætlan, ið løgd er fyri leiðina fram til fult sjálvræði. Henda ætlan merkir í stuttum, at byrjað verður at skráseta veljarar í juli 1989. Altjóða eftirlitsliðið við valinum kemur til Namibia í oktober. Tann 1. november verður val til ein grundlógargevandi tjóðfund og 15. november skulu suðurafrikansku hermenninir fara úr Namibia og allar suðurafrikanskar herstøðir stongjast. Síðan skal tjóðfundurin sita til nýggj grundlóg er samtykt og so skal stjórn skipast. Nær hetta verður veit eingin, men gongur alt sum ætlað fær Namibia eina lógliga stjórn einaferð í 1990.

Hetta merkir ikki neyðvendugvís, at lond, ið hava hug at samstarva við Namibia, noyðast at bíða til 1990. Tey kunnu møguliga vera við at hjálpa Namibia í yvirgangstíðini, *men so má tað gerast innan karmarnar hjá S.T.*

Meginfortreytin fyri, at alt kann ganga eftir ætlan, er, at Suðurafrika heldur S.T.-samtyktirnar og fylgir teimum ætlanum, sum S.T. hevur sett upp. Hvussu gongst so við hesum? Sambært norska útvarpinum, S.T., CCN o.o., gongur út av lagi. Suðurafrika er meginmeinbogin fyri tí gongd, sum byrjað er við S.T.-samtyktunum nr. 628 og 629.

Her eru nøkur dømi: Suðurafrika hevur bundið seg til at taka herfólk sítt úr Namibia. Síðan 1. jan. í ár hevur Suðurafrika *økt* um her sín við 3000 hermonnum! Hetta er beinleiðis brot á ST-samtyktirnar og boðar ikki frá góðum.

Suðurafrika hevur bundið seg til *ikki* at leggja seg út í skráseting av veljarunum. Kortini hevur Suðurafrika flutt túsundtals UNITA hermenn úr Angola til bygdir og býir í Namibia, har hesir verða skrásettir sum namibiarar, sum so kunnu velja tann fyrsta november. Hetta fyri at stuðla flokkinum hjá verandi stjórn í Windhoek — altso apartheidstjórn Katjuangua, ið sleppur at taka lut í valinum. Tað er ikki torført at ímynda sær, hvussu fræls hesi val verða við bygdunum yðjandi av alvápnaðum UNITA-hermonnum. Her munar ST-liðið UNTAG lítið og kann ikki forða tí UNITA terrori, sum sambært norska útvarpið, BBC og CCN longu er byrjaður.

Tað kundu verið nevnd mong onnur dømi, um allar teir meinbogar, ið Suðurafrika leggur fyri eitt frítt Namibia, men tað lata vit fara her. Hetta er nóg mikið til ta niðurstøðu, at framtíð Namibia er alt annað enn ljós og frælst verður landið ikki, so leingi Suðurafrika er til staðar har so ella so.

Møguleikar løgmanns

At enda skulu vit venda aftur til úrslitið fyri kanningum løgmanns. Hansara útgangspunkt er, so vítt vit kunnu síggja, orð hansara í Danmarks radio um eina komandi namibiska óhefta stjórn og hennara viðurskifti við føroysku reiðararnar: »De bliver nok glade for at beholde vores skibe der — som en slags udviklingshjælp«.

Ja, soleiðis fullu orðini og tey vóru so endurtikin við ymiskum variatiónum í ÚF og SvF. Til at hjálpa Osmundi Justinussen og Óla Breckmann frá apartheidsamstarvi og yvir í »en slags udviklingshjælp« skal løgmaður okkara nýta danska uttanríkisráðharran, Uffe Ellemann Jensen. Men var tað ikki júst Jógvan Sundstein, sum vann eitt heilt løgtingsval við herrópinum: »Fingrene væk fra Namibia, Uffe«! Danir eiga ikki at leggja seg út í føroysk sáttmálaviðurskifti, æt tað tá.

Men lat gá, mangt er í neyðini nýtt og løgmaður er nú so sperdur, at hann má leita sær hjálp frá mongum, sum ikki vóru í Fólkafloksins krithúsi í valstríðnum, eitt nú Uffa og Jonathan, sum í skrivandi stund av Dagblaðnum verður útgjørdur við hornum og hala!

Nógv meira áhugavert er, hvørjar eginleikar Jógvan Sundstein, løgmaður, veruliga hevur at bøta aftur tann landsskaða, sum partamaður og stavnamaður hansara hevur volt.

Úrslitið er dapurt. Tað er heilt óhugsandi, at SWAPO, ið kemur til valdið í Namibia, tá og um alt gongur eftir ætlan S.T., fer at lívga teimum, sum aktivt hava stuðlað apartheidstýrinum í Windhoek. Skuldi tað ótrúliga hent, at ein komandi stjórn í Namibia gjørdist so sjarmerað og hugtikin av Uffa Ellemann og Jógvani Sundstein, at hon fekk hug at ganga teimum á møti, so *fekk* hon tó ikki gjørt tað. Hetta tí einhvør komandi namibisk stjórn hevur bundið seg til at halda S.T.samtyktirnar. Ein teirra »United Nations Decree No. 1 for protection of the Natural Resources of Namibia« sigur at vinnufyritøkur, ið hava brotið S.T.samtyktirnar kunnu verða revsaðar av eini komandi frælsari namibiskari stjórn.

Eini triði møguleiki var at farið beinleiðis til S.T. nú beinanvegin. Men hvussu er S.T. ikki viðfarið av Fólkaflokkinum? Kanska lesa S.T.-embætismenninir ikki Dagblaðið, men flestu teirra, sum arbeiða við Namibiamálinum, eru jú norðbúgvar — einir tveir koma enntá beinleiðis frá skrivstovuni hjá Stoltenberg. Munnu teir ikki kenna ta støðu føroyska stjórnarblaðið og føroyski stjórnarflokkurin hava havt til ST til hendan dag? Kanska hava teir ikki beinleiðis frætt, at Fólkaflokkurin í valstríðnum kallaði ST fyri eitt røvarabøli, men hvør veit? Verðin er lítil og Óli Breckmann ferðast víða — hansara umdømi ferðast ikki minni! Og hvussu varð varaaðalskrivarin, Namibiacommiserurin og Føroyavinurin Bent Carlson, sáli, ikki viðfarin í føroyska stjórnarblaðnum, tá hann royndi at røkja skyldur sínar? Nei, har man lítil hjálp vera at heinta!

Sostatt hevur Jógvan Sundstein, løgmaður, bert eitt í vali: at mæla sínari samgongu til at samtykkja tað uppskot um bann fyri búskaparligum samstarvi við apartheidstjórnirnar í Windhoek og Prætoria, ið liggur á tingborði — eitt uppskot, ið líkist samsvarandi lóggávu í *øllum* Vesturheiminum. Tá tað er gjørt kunnu vit fara undir at bøta tann skaða, sum privati uttanríkispolitikkur Óla Breckmanns hevur gjørt á okkara umdømi, okkara veiðimøguleikar í Grønlandi og okkara sjálvsvirðing sum tjóð. Tá fyrst kunnu vit fara at tala um at veita Namibia menningarhjálp.

Joannes Dalsgaard

Helvt um.....

Framhald av síðu 7

	Fyri	ímóti	veit ikki	ósvarað	
Kvinnur:	34,5	37,4	23,4	4,6	= 100%
Menn:	41,7	38,0	14,5	5,8	= 100%
Íalt:	386	381	191	53	= 1011

Sum vit síggja á tølunum, er tað hjá mannfólkaveljarunum meiriluti fyri at føroysk fiskiskip fara niður til Namibia at fiska. Harafturímóti er tað hjá konufólkaveljarunum ein lítil meiriluti ímóti at føroyingar fara til Namibia at fiska.

Eisini kunnu vit út frá tølunum síggja, at føroyskar kvinnur ikki hava lætt við at taka støðu til hetta mál. Vit síggja jú, at næstan tvær ferðir so nógvar kvinnur sum menn ikki hava tikið støðu til hetta týdningarmikla mál.

Orsøkirnar til at hetta er sum tað er, kunnu vit kjakast um, bæði leingi og ofta.

Men hvussu álitandi eru hesi tølini? Samanbera vit úrslitið av løgtingsvalinum í november í fjør við veljarakanning okkara:

Atkvøðugreiðslan í %

	Løgtingsvalið 8. nov.	Veljarakanning
N. Streymoy	7,8%	4,4%
S. Streymoy	34,3%	28,5%
Eysturoy	21,2%	29,8%
Vágar	6,4%	7,4%
Norðoyggjar	13,5%	15,4%
Suðuroy	13,0%	11,0%
Sandoy	3,7%	3,5%
Íalt	99,9%	100,0%
	(28.787)	(1.118)

Vit síggja, at valdømini Norð- og Suðurstreymoy og Suðuroy hava ein størri part av atkvøðum við valið (55,1%) enn í kanningini (43,9%). Somuleiðis hava Norðuroyggjar og Eysturoy ein minni part við valið (34,7%) enn í okkara kanning (45,2%).

Valdømini, har mótstøðan ímóti at fiska við Namibia er størst, eru undirumboðað í kanning okkara. Hinvegin eru valdømini, har undirtøkan fyri fiskiskapi í Namibia er størst, yvirumboðað. Meirilutin fyri Namibia uppá 0,8% má tí sigast at vera heldur óvissur.

Nakað, sum kann hava ávirkað støðu veljarans til Namibiamálið aftaná kanningina er, at grønlendska heimastýrið hevur lagt seg út í stríðið.

Grønlendska heimastýrið sigur, at vit ongar serkvotur fáa so leingi vit ikki boykotta Suðurafrika og Namibia.

Spennandi verður at síggja hvussu leikur fer, nú málið skal viðgerast í løgtinginum 7. febr., tí sum øllum kunnugt hevur ein samgongulimur hótt við at taka seg úr samgonguni, um vit ikki boykotta Suðurafrika og Namibia. Livst so spyrst.

Uppgávan er skrivað av 2. as og 2 xs við Gøtugjógv saman við læreranum Erik Arge í jan. '89